# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Málið er persónligt met

*27. september fara tær svimjararnir Heidi Andreasen og Esther G. Hansen til Australia fyri at luttaka í Paraolympisku leikunum í Sydney*



*Katrin Johansen leggur í løtuni seinastu hond á fyrireikingarnar saman við teimum báðum svimjigentunum, Esther G. Hansen og Heidi Andreasen. 27. september gongur leið teirra til Australia*

***Mynd: Jens Kr. Vang***

STEFAN Í SKORINI

Tær hava vant miðvíst tey seinastu fýra árini fyri at vera til reiðar til hesa kappingina, sum er tann størsta í heiminum.

Nýggju ferðir um vikuna hava tær vant í summarfrítíðini í ár og í fjør, meðan tær hava vant heldur minni, síðan skúlin byrjaði. Tær eru tí í góðari venjing undan kappingini, men tær vilja einki siga, um talan verður um at koma heimaftur við heiðursmerkjum.

- Fyri ikki at leggja nakað óneyðugt trýst á genturnar hava vit gjørt av ikki at siga nakað alment um, hvat vit vænta okkum, sigur Katrin Johansen, sum er venjari hjá gentunum.

Sjálvar miða Heidi og Esther eftir at seta persónligt met á teimum ymsu teinunum, tí so ber ikki til at gera tað nógv betur. So má bera ella bresta.

Fyri einum ári síðani gjørdist greitt, at tær høvdu klárað kravtíðirnar og tí kundu fara undir fyrireikingarnar til leikirnar. Tað skilst á øllum brøgdum, at tær eisini hava tikið hesa uppgávu í størsta álvara.

**Hørð kapping**

Katrin Johansen, sum hevur royndir í slíkum kappingum, sigur, at kappingin harðnar í hvørjum, og heimsmet verða sett, hvørja ferð kappingar eru.

Tað krevur tí ómetaliga nógv, um svimjararnir skulu gera seg galdandi á paraolympisku leikunum. Tað tykist sum kappingin harðnar í hvørjum, tí meira verður gjørt við venjingina.

Katrin Johansen kennir eisini nógv til slíkar kappingar, tí hon hevur verið við í tveimum olympiadum. Hon var í USA í 1984 og í Suður Korea í 1988.

Í Soeul í 1988 gjørdist besta hálið hjá føroyingum higartil í paraolympisku leikunum. Katrin Johansen, Kristina Næs, Tóra við Keldu og Jóhan Samuelsen vóru tá í ferðalagnum og fleiri heiðursmerki vórðu tá í viðførinum. Eisini okkurt av gulli.

Katrin er tí væl egnað at venja tær báðar genturnar, sum eisini hava Katrin sum fyrimynd og sammeta seg við Katrin, tá hon var á teirra aldri.

Katrin skal eisini vera lærari hjá teimum í tær fimm vikurnar, tær eru burtur úr Føroyum.

**Væl fyrireikaðar**

15 ára gamla Esther G. Hansen er úr Havn, og 14 ára gamla Heidi Andreassen er av Eiði, og hon hevur tí verið noydd at ferðast til Havnar at venja. Esther hevur ein lammaðan arm, meðan Heidi hevur klumpføtur.

Tær hava tikið lut í fleiri kappingum uttanlands. Í juni vóru tær í Sheffield í Onglandi og í januar varð leiðin løgd til Hollands. Eisini hava tær verið við í EM í 1999 og Malmø Open.

Tær eru tí vanar við at kappast á høgum støði. Eisini hava tær havt møguleikan at svimja í 50 metra hyljum uttanlands. Tað er ein fyrimunur, at tær hava roynt hyljar, sum eru 50 metrar til longdar, tí tað ber ikki til her heima.

Umframt tað serligu venjingina hjá Katrin, svimja tær báðar í Havnar Svimjifelag, og tær hava eisini vunnið okkurt heiðursmerki í føroyameistaraskapinum.

Tað er eisini neyðugt at vera í góðari venjing, tí tær skulu vera við í seks kappingum hvør.

Esther skal svimja 200 m blandað, 50 m og 400 m frí, 100 m bringu, 100 m firvald og 100 m rygg. Heidi skal svimja 100 m firvald, 100 m rygg, 200 m blandað og 50, 100 og 400 m frí.

**100.000 áskoðarar**

Setanin verður 18. oktober, og leikirnir enda 30. oktober. Tær føroysku genturnar fara fyrst til Brisbane í nakrar vikur, har tær skulu venja við norðurlendskum svimjarum.

Tá tað føroyska flaggið verður borið inn á leikvøllin við setanina, verða 100.000 fólk, sum sita á áskoðaraplássunum og hyggja.

4000 ítróttarfólk verða við á leikunum, meðan eini 3000 hjálparar, venjarar, læknar og onnur eisini verða til staðar.

Genturnar velja at taka hetta sum eina stóra uppliving, og á tíðindafundinum fingu tær tey ráð frá Jóhan Samuelsen úr ÍSB, at tær skulu hugsa sær, at tær enn eru í Gundadali og gloyma alt stásið og teir túsund áskoðararnar á sitiplássunum. Tær hava einki at tapa, tí hetta er fystur ferð, tær eru við, og tí liggur als einki trýst á teimum.

# Glasgow Rangers eru á odda

*Mest óvæntaði úrslitið hetta umfarið var greiða tapið, sum Barcelona var fyri í Turkalandi. Bæði Rosenborg og Helsingborg máttu taka til takkar við tapi á útivølli*

JÁKUP MØRK

Eftir tey bæði fyrstu umførini av sterkastu europoeisku kappingini, er skjótt at staðfesta, at teir í Herfølge onga orsøk hava at skammast um tapið fyri Glasgow Rangers.

Skoarnir hava nevnliga framvegis fult stigatal, eftir at tað eydnaðist teimum at vinna torføra útidystin móti franska AS Monaco.

**Barcelona tapti**

Størsti spenningurin tykist vera í bólki H. Barcelona, sum hølvaði Leeds av í fyrsta umfarinum, kom so dyggiliga niður á jørðina mikukvøldið, tá turkiska Besiktas vann heili 3-0.

Samstundis vann Leeds sín dyst móti AC Milan, tó at sigurin ikki kom í hús, fyrr enn í seinastu minuttunum, tá Dida í Milan málinum framdi eitt rættuligt drop.

**Gongst væl hjá bretum**

Føroyingar hava ofta stóran áhuga fyri enskum fótbólti, og í so máta er hugaligt at staðfesta, at tey ensku liðini tykjast vera væl fyri í løtuni.

Leeds vann sum nevnt á heimavølli móti Milan, Manchester United fekk javnleik á útivølli móti Dynamo Kiev, og Arsenal tykist nærum hava tryggjað sær víðari luttøku, nú teir saman við Laxio hava 6 sti í sínum bólki.

Móti ukrainska Shakhtar Donetsk stóð tó leingi á. Ukrainar løgdu seg miðskeiðis í fyrra hálvleiki á odda 2-0, men beint fyri hálvleik minkaði Wiltord um munin, tá hann fangaði returin frá einum brotssparki.

Ukrainska liðið helt tó leingi fast um leiðsluna, og ikki fyrr enn Martin Keown eisini fór fram at royna seg, bragdaði í tveimum førum hjá Arsenal.

Verandi meistararnir úr Madrid høvdu eins og í fyrsta umfarinum trupulleikar av mótstøðuni, sum hesu ferð var úr Moskva.

Tað eydnaðist tó at toga ein sigur til høldar, eftir at Helguera beint eftir steðgin skeyt einasta málið í dystinum.

**Norðanlondini taptu**

Hjá norðurlendsku liðunum gekst ikki so væl mikukvøldið. Svenska Helsingborg tykist longu at hava sagt farvæl til víðari luttøku, eftir at teir hava verið fyri greiðum tapum tey bæði fyrstu umførini.

Norska Rosenborg er tó framvegis væl við í kappingini, hóast tað at enda gjørdist talan um eitt 3-1 tap móti Bayern München. Rosenborg var annars á odda í hálvleikinum, og fram til tað restaði gott korter, hildu teir fast um leiðsluna. At enda gav Bayern trýstið tó úrslit, og innan sjey minuttir fingu teir tey trý málini, sum tryggjaðu teimum sigurin.

Tað bendir sostatt á, at Bayern München fer avstað við fyrsta plássinum í norðurlendska bólkinum, meðan avgerin um annað plássið møguliga má bíða til seinasta umfar, tá Rosenborg skal á vitjan í Fraklandi.

Urslit og støður úr bólkaspælinum eru á at síggja á næstu síðu.



# Johan fastur maður í OB

*AGF varð eyðmýkt í Århus, og avloysarin hjá Toda Jónsson skoraði fýra mál, tá FCK gjørdi sína skyldu*



*Nýggi føroyski landsliðsleikarin tykist væl ávegis at vinna sær fast pláss á besta liðnum hjá OB*

Vanliga plaga tað at møta umleið eitt hundrað fólk upp, tá Vejen, sum spælir í einari av jysku deildunum í Danmarksseriuni, dystast á heimavølli. Steypadysturin ímóti FCK var longu klokkan 16.30 seinnapartin mikudagin, men kortini møttu ikki færri enn 2.630 áskoðarar upp. Tey vóru komin fyri at síggja FCK stjørnurnar spæla, men sjálvandi vónaðu tey flestu, at teirra lið fór at standa fyri einari av stóru sensatiónunum, sum av og á koma fyri í steypakappingum. Men soleiðis gekk tað als ikki.

FCK vann 5–1. Superliguliðið var sera sannførandi, og teir vóru frammanfyri 5–0, áðrenn heimaliðið í 86. minutti fekk loyvi at pynta um.

Todi Jónsson var ikki við í Vejen. Roy Hodgson hevði gjørt av, at Todi og onkrir aðrir av føstu monnunum – eitt nú Zuma og Niclas Jensen – skuldu vera eftir í Keypmannahavn og hvíla, so teir vera heilt væl fyri, tá FCK sunnudagin skal til Silkeborg.

Meðan Todi Jónsson var skaddur, fekk Thomas Thorninger møguleikan ytst á miðvøllinum í vinstru. Tá gjørdi hann einki serligt um seg, men mikudagin lá væl fyri. Thomas Thorninger skoraði fýra av teimum fimm FCK málunum. Tað gjørdi hann í 11., 44., 65., og 83. minutti. David Nielsen var ein av teimum, sum fekk møguleikan hesa ferð, og hann skoraði triðja FCK málið í 53. minutti.

**Johan fastur maður**

Tá Johan B. Hansen fyrst í mánaðinum var í Føroyum í sambandi við landsdystin ímóti Slovenia, hevði hann ongantíð verið ímillum teir fyrstu ellivu í OB. Nú tykist tað av álvara at ganga undan hjá verjumanninum. Sunnudagin var hann á OB liðnum í Parkini ímóti FCK – í OB halda teir, at hann stóð seg sera væl – og mikudagin var hann aftur á liðnum í lokaluppgerðini ímóti B1909.

Hóast B1909 er í 2. deild, so var áhugin á Fyn størri enn fyri øllum hinum steypadystunum. 6.053 áskoðarar møttu upp , og teir vóru vitni til, at OB beinanvegin setti tingini upp á pláss. OB skoraði í 9. og 13. minutti, og so var alt avgjørt. Sigurin varð sligin rimmar fastur í næstsíðsta minuttinum.

Í Odense gjørdu teir undan dystinum nógv burturúr hagtølunum, sum søgdu, at OB og B1909 tríggjar ferðir áður høvdu dystast í steypakappingini. Serliga áhugavert søgdu teir tað vera, at allar tríggjar ferðirnar er vinnarin komin í finaluna. So fáa vit at síggja, hvussu tað fer at hilnast í steypakappingini hjá Johan B. Hansen og OB.

**AGF eyðmýkt**

Óli Johannesen og AGF vóru á útivølli á Riisvangen stadion í Århus. Tað gongur á allan hátt av skriðuni hjá AGF, og tað sást aftur í steypadystinum, sum teir taptu 1–0 ímóti lítlabeiggjanum, FC Aarhus. Hetta liðið er aftast í 1. deild, og sigurin mikudagin var tann fyrsti í hesum kappingarárinum. Ósigurin hjá AGF var tann sætti á rað, og hetta var triðja ferðin á rað, at teir taptu við einum máli.

AGF hevði alt spælið. Í 1. hálvleiki høvdu teir fimm púa upplagdar møguleikar, og í 2. hálvleiki høvdu teir tríggjar hundrað prosents møguleikar. Men mitt í 2. hálvleiki skoraði FC Aarhus, og tað var nóg mikið.

Um tað ikki eydnast at venda fíggjarligu gongdini í AGF, so fara teir á heysin. AGF hevur heitt á býráðið í Århus um at hjálpa teimum, men í fyrradagin svaraði býráðið, at hetta fór ikki at bera til. Býráðið helt, at um teir fóru at hjálpa AGF, so kundu allar fyritøkur í Århus, sum standa illa í tí, venda sær til býráðið og við góðum rætti rokna við at fáa hjálp og stuðul. Fíggjarliga óskilið í AGF er framvegis stórt, og nú verður møguleikin fyri at teir missa sessin í fremstu deildini nevndur heilt ofta.

Mánakvøldið kemur botnliðið úr Haderslev at spæla í Århus. Um AGF ikki vinnur tann dystin verður leikliga kreppan fullkomin, siga teir í AGF.

**Jákup og teir uppí**

Í dag verður lutur kastaður um, hvussu liðini skulu hittast í fimta umfarinum í steypakappingini. Tá vera Herfølge og hini liðini, sum higartil ikki hava tikið lut í DONG Cup, við í hattinum.

Umframt AGF er eitt annað superligulið liðugt í steypakappingini. Tað er botnliðið Haderslev, sum mikudagin á útivølli tapti 2–0 ímóti Ballerup. Tað var sera óvæntað, tí Ballerup spælir í Danmarksseriuni. FCM vann 5–1 á útivølli ímóti Fremad Amager, Vejle vann 2–1 í Brønshøj, og Horsens vann eftir brotssparkskapping 4–2 ímóti Frem (eftir vanliga leiktíð var einki mál komið). Esbjerg vann 2–1 á Køge, og so noyddist Danmarksseriuliðið Døllefjelle Musse at lúta. Teir taptu á heimavølli 2–0 ímóti 2. deildarliðnum Holsterbro.

JH

## Úrslitini týs- og mikukvøldið í UEFA Champions League

**Bólkur A**

Bayern Leverkusen-Sportin Lissabon 3-2 (0-1)
0-1: Cruz 12
1-1: Ramelow 65
2-1: Brdaric 73
3-1: Neuville 77
3-2: Sa Pinto (br.) 79

Real Madrid-Spartak Moskva 1-0 (0-0)
1-0: Helguera 51

**Bólkur B**

Arsenal-Shakhtar Donetsk 3-2 (1-2)
0-1: Bakharev 26
0-2: Vorobei 29
1-2: Wiltord 45
2-2: Keown 85
3-2: Keown 90

Lazio-Sparta Prag 3-0 (1-0)
1-0: Inzaghi
2-0: Simeone
3-0: Inzaghi

**Bólkur C**

Heerenveen-Valencia 0-1 (0-1)
0-1: Kily Gonzales 38

Olympiakos-Olympique Lyon 2-1 (2-0)
1-0: Quaye 19
2-0: de Oliveira 34
2-1: Foe 88

**Bólkur D**

AS Monaco-Glasgow Rangers 0-1 (0-1)
0-1: Van Bronckhorst 8

Sturm Graz-Galatasary 3-0 (1-0)
1-0: Yuran 32
2-0: Schopp 64
3-0: Schopp 81

**Bólkur E**

Juventus-Panathinaikos 2-1 (1-1)
1-0: Tacchinardi 35
1-1: Goumas 45
2-1: Trezeguet 83

Deportivu La Coruna-Hamburger SV 2-1 (1-0)
1-0: Pandiani 44
1-1: Barbarez 53
2-1: Scaloni 89

**Bólkur F**

Bayern München-Rosenborg 3-1 (0-1)
0-1: Sørensen 38
1-1: Jancker 73
2-1: Elber 77
3-1: Linke 80

Paris St. Germain-Helsingborg 4-1 (1-1)
1-0: Anelka 25
1-1: Johansen 45
2-1: Robert 63
3-1: Christian 81
4-1: El-Karkouri 90

**Bólkur G**

Anderlecht-PSV Eindhoven 1-0 (0-0)
1-0: Dheedene 81

Dynamo Kiev-Manchester United 0-0

**Bólkur H**

Leeds United-AC Milan 1-0 (0-0)
1-0: Bowyer 89

Besiktas-Barcelona 3-0 (1-0)
1-0: Dursun 38
2-0: Dursun 75
3-0: Nouma 87

## Støðan í bólkaspælinum

**Bólkur A**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| Real Madrid | 3 | 2 | 4 |
| Spartak Moskva | 2 | 1 | 3 |
| Bayern Leverkusen | 3 | 4 | 3 |
| Sporting Lissabon | 4 | 5 | 1 |

**Bólkur B**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| Lazio | 6 | 0 | 6 |
| Arsenal | 4 | 2 | 6 |
| Sparta Prag | 0 | 4 | 0 |
| Shakhtar Donetsk | 2 | 6 | 0 |

**Bólkur C**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| Valencia | 3 | 1 | 6 |
| Lyon | 4 | 3 | 3 |
| Olympiakos | 2 | 3 | 3 |
| Heerenveen | 1 | 4 | 0 |

**Bólkur D**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| Glasgow Rangers | 6 | 0 | 6 |
| Sturm Graz | 3 | 5 | 3 |
| Galatasary | 3 | 5 | 3 |
| AS Monaco | 2 | 4 | 0 |

**Bólkur E**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| Juventus | 6 | 5 | 4 |
| Deportivo La Coruna | 3 | 2 | 4 |
| Hamburger SV | 3 | 6 | 1 |
| Panathinaikos | 0 | 1 | 1 |

**Bólkur F**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| Bayern München | 6 | 2 | 6 |
| Paris St. Germain | 5 | 4 | 3 |
| Rosenborg | 4 | 4 | 3 |
| Helsingborg | 2 | 7 | 0 |

**Bólkur G**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| Manchester United | 5 | 1 | 4 |
| PSV Eindhoven | 2 | 2 | 3 |
| Anderlecht | 2 | 5 | 3 |
| Dynamo Kiev | 1 | 2 | 1 |

**Bólkur H**

| | f | m | s |
|---|---|---|---|
| AC Milan | 4 | 2 | 3 |
| Barcelona | 4 | 3 | 3 |
| Besiktas | 4 | 4 | 3 |
| Leeds United | 1 | 4 | 3 |